Ziebart TidyCar

# FORKELA BILIN og lat hann væl í til veturin






Um bilurin hevur mist glansin ella tú bert ynskir at geva honum ta viðgerð, hann hevur uppiborið, hava vit serkøn fólk á økinum.

Vit tilmæla at allir bilar fáa eina árliga lakkforsegling fyri at verja lakkið, nú veturin stendur fyri framman.

Ein Tidy Car viðgerð fær bilin at síggja út sum nýggjur og ger hann lættari at viðlíkahalda og halda reinan.

**Vit viðgera øll bilmerkir.**



VIÐGERÐ SERTILBOÐ

| 1.595,- | 1.695,- | 1.795,- |
|---|---|---|
| Mini bilur | Miðal bilur | Stórur bilur |

Tilboðið er galdandi til 28. februar 2010

REYNI SERVICE P/F
Vegurin Langi 188 Hoyvík tlf. 35 30 40
Klingrugarður 700 Klaksvík tlf. 47 30 40
www.reyniservice.fo rs@reyniservice.fo

# Maskinmeistari



**Eitt starv sum maskinmeistari á elverkinum hjá SEV á Strond í Klaksvík er leyst at søkja til setan skjótast tilber.**

**Starvsinnihald**
Starvið umfatar rakstur og hald av elverkinum á Strond, viðlíkahald av mobilaggregatum eins og viðlíkahald av teimum fimm smáverkunum á Fugloynni, í Mykinesi, á Skúvoynni, í Koltri og á Stóru Dímun, ið tilsamans hava 14 framleiðslueindir. Hartil eru 3 eykaverk, sum eisini hoyra til starvsøkið.

Talan er fyrst og fremst um dagarbeiði, men talan kann blíva um nakað av vaktararbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

**Arbeiðsstaður**
Arbeiðsstaðið er á elverkinum á Strond, og arbeitt verður á og út frá hesum arbeiðsstaði til hini elverkini eftir tørvi.

**Førleikakrøv**
Tú hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, t.e. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv. Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir á økinum ella á líknandi øki.

**Løn**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Starvið er flokkað í lønarflokki 12. Byrjunar- og endalønin í 12. lønarflokki er í løtuni netto ávikavíst kr. 28.686,33 og kr. 29.898,81 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávikavíst kr. 3.872,65 og kr. 4.036,34 um mánaðin.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan, sum verður roknaður frá próvtøkudegnum, men er treytaður av fakliga viðkom

**Umsóknir**
Vinaliga send umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum til Elfelagið SEV, Postrúm 319, 110 Tórshavn.
**Umsóknarfreistin er mikudagin 3. mars 2010.**

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hans Jákup Petersen, verksmeistara ella til Anders Nedergaard-Hansen, leiðara á Framleiðsludeildini, báðir á telefon nr. 346800.
andi arbeiði síðani tá.

SEV

# Sjøtul settur á sosialfrøðiliga gransking

**TÍÐINDASKRIV**
*Almannamálaráðið*
*18. februar 2010*

Í vikuni hava 700 pensjónistar fingið spurnarblað frá Fróðskaparsetrinum. Spurningarnir eru liður í nýggjari kanning av livikorunum hjá fólkapensjónistum í Føroyum, sum landsstýriskvinnan í almannamálum hevur tikið stig til.

Livikorskanningin er úrslit av samstarvi millum fleiri partar. Í heyst fekk Rósa Samuelsen ein fyrispurning frá Landsfelag Pensjónista, ið høvdu áhuga í at fáa korini hjá fólkapensjónistum í Føroyum kannaði. Síðani hevur Almannamálaráðið fyrireikað kanningina, sum Fróðskaparsetrið er sett at gera.

»Við hesari kanning hava vit sett sjøtul á sosialfrøðiliga gransking í Føroyum, sum er eitt av málunum hjá samgonguni«, sigur Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna, og leggur aftrat:

»Samstundis fáa vit til vega týdningarmikla og alneyðuga vitan um viðurskiftini hjá pensjónistum, nú farið verður undir stórar rembingar á eldraøkinum, bæði við pensjónsreformi og samskipan av eldrarøktini«.

**Livikorskanningin**

Í kanningini verður dentur lagdur á at fáa svar uppá, hvussu fólkapensjónistar sjálvir meta um sína støðu. Hava tey eitt trygt og gott lív. Hvussu klára tey seg fíggjarliga. Hvat eru tey nøgd við, hvat kundu tey hugsað sær annarleiðis, eitt nú bústaðar- og ferðsluviðurskifti. Fáa tey neyðuga hjálp, um tørvur er á tí? Hava tey upplivað, at livifóturin versnaði, tá ið tey fóru av arbeiðsmarknaðinum, og um ja, hvat hava tey tá valt at spara uppá.

Kanningin verður gjørd á tann hátt, at úti við 700 spurnarbløð eru send út til fólk frá 67 ár og eldri. Fólkini eru tilvildarliga útvald millum teir umleið 6000 fólkapensjónistarnar, sum eru í landinum.

Spurningarnir kunnu flokkast í fýra bólkar: teir fysisku karmarnir (t.e. bústaður og mobilitetur); fíggjarstøða (inntøkur og útreiðslur); sosiala lívið (frítíð, felagslív, netverk) og heilsustøða.

Úrslitini verða kunngjørd einaferð seinni í ár.